

2021


Samfelagstilvit



3	Lunnar lagdir undir framtíðina
4 - 5	Ein sterk veitingarketa
6 - 7	Vatn kemur aftur, har vatn hevur verið
8 - 9	Burðardygt mál í eygsjón
10 - 11	Operatión null CO_2-útlát
12 - 13	Rótin til ábyrgd
14 - 17	Blómandi verð tørvar blómandi samfelag
18 - 19	Vøkstur í beinan norðan
22 - 23	Kundin í miðdeplinum
24 - 25	Einstaklingar í eini heild
26 - 27	ESG í tølum
28 - 29	Frá Japan til Brasil
30 - 31	500 tímar við føroyskum

Jan Ziskasen, samtaksstjóri

Lunnar lagdir undir framtíðina



Vit eru oyggjaland, og lívið á hesum 18 grønu norðuratlantisku blettum er tongt at góðum tilknýti til náttúruna. Vit eru vælsignað við óspiltari náttúru, og hana skulu vit varðveita væl. Tað er av hesi orsøk, at vit við ársbyrjan 2021 fóru miðvíst til verka at kanna og kortleggja okkara orkunýtslu og útlát.

At verja umhvørvið og nýta orku skynsamt er ikki fremmant fyri okkum. Við nógvum árum á baki eru vit vorðin ryggsterk og tilvitað um okkara leiklut at slóða fyri burðardyggari menning og búskaparligum vøkstri, uttan at natúrliga tilfeingið versnar fyri komandi ættarlið.

Lítil neisti kann birta stóran eld, verður mangan sagt. Vit vóna sostatt, at okkara operatión null CO_2-útlát hugkveikir onnur at taka lut og hugsa um váðar og møguleikar, sum standast av umhvørvis-avbjóðingum.

> Hvussu víkir og vendir er framtíðin burðardygg, og at enda vinnur hann, ið einki vágar, einki. Tískil vilja vit vera fyrisprákarar og vísa í verki, at tað ber til at duga hárfínu javnvágina millum burðardygga menning og tøkni, sum skal flyta blómandi samfelagið inn í framtíðina.

Í grannalondum og kring allan heimin eru 5G og fipurbreiðband longu vorðin týðandi partar av talgilda samfelagnum, og soleiðis skal tað eisini verða her heima. Í 2021 settu vit ferðina upp og tóku stórar avgerðir, so vit ikki halta aftaná, samstundis sum vit minka okkara umhvørvisslóð.

Í hesi frágreiðing seta vit sjóneykuna á tilvitanina um samfelagið, vit liva í.





Ein sterk veitingarketa

Føroya Tele er samtak við móðurfelagi og dótturfeløgunum Shefa, NET, FT Samskifti og Televarpið. Í felag gevur hetta okkum eina sterka veitingarketu, har ið einstøku liðini hvørt sær geva íkast til, at vit veita fjarskifti í víðari merking.



Einki sum móðir

Móðurfelagið er savnandi liðið í samtakinum og hevur samstaksstjórn og starvslið innan fyri KT, fíggjar- og starvsfólkaøkið. Aðalmálið hjá samtakinum er at knýta Føroyar í eina betri framtíð, og greiðar synergieffektir millum feløg og deildir leggja sjálvsagdan gróðrarbotn undir menningina. Gongdin í samtakinum er í stóran mun grundað á hesar samanrenningar.

Á havsins botni

Endamálið hjá Shefa var og er framvegis at veita Føroyum samband við útheimin gjøgnum undirsjóvar-sambond, men sjókaðlarnir hava lagt grundarlag fyri øktum útflutningi til eitt nú frálandavinnuna í danska partinum av Norðsjónum og vestan fyri Hetland. Shefa er sólskinssøga burturav, tí felagið hevur megnað at vent tungum rakstri til positivan rakstur eftir bert fáum árum.

Liður í ketuni

NET er tað, sum bindur okkum saman og syrgir fyri, at allir føroyingar kunnu taka ómaksleyst samskifti sum givið. NET eigur og rekur kervið undir øllum fjarskiftis-, sjónvarps- og útvarpstænastum í Føroyum. Kervið skal røkjast og mennast, og tað er sjálvsagda uppgávan hjá felagnum, samstundis sum felagið selur nettænastur til allar fjarskiftisveitarar undir javnbjóðis treytum.

Har hjartað slær

FT Samskifti, hvørs fremsta mál er at veita einfalt fjarskifti og seta kundan í miðdepilin, er kundavenda drívmegin í samtakinum. Umframt allan kundafrontin byggir FT Samskifti á tøkniliga undirstøðukervið í samtakinum og eigur og rekur egið farnet, sum dekkar nærum 100% av landafrøðiliga økinum í Føroyum.

Kelda til undirhald

Televarpið bjóðar sjónvarp og hevur sum mál at veita kundanum heildaruppliving. Umframt at bjóða hópin av útlendskum rásum arbeiðir Televarpið eisini við at skapa egið sjónvarpstilfar. Televarpið eigur egið sjónvarpsnet, sum dekkar um 94% av øllum húsarhaldum. Felagið er eisini virkið uttanlands og veitir tøkniligan pall til oman fyri 10.000 brúkarar í ávikavist Danmark og Grønlandi.



Umsetningur

407 mkr.

Útgoldið í løn

97 mkr.

Partafelagsskattur

8.2 mkr.

Vinningsbýti

30 mkr.

Íløgur

74 mkr.

Vatn kemur aftur, har vatn hevur verið

Vit tæna samfelagnum, og tað, vit forvinna, skal dryppa aftur á fólkið, her býr. Síðani 1998 hava vit lagt slakar tríggjar milliardir krónur í at tryggja, at oyggjasamfelagið mitt úti í Norðuratlantshavi fylgir tíðarrákinum og hevur nútímans hentleikar.

Nógv vatn er runnið í ánni, síðani Telefonverk Føroya Løgtings varð stovnað og tøknin, sum amerikumaðurin Alexander Graham Bell legði lunnar undir, varð sjósett.

Í dag liva vit í talgildum heimi, sum broytist dag frá degi, og tað er okkara skylda at tryggja, at Føroyar ikki verða eftirbátur í talgildu samansjóðingini.

Føroyar eru framkomið oyggjasamfelag, og fólkið setur krøv. Tað eru hesi krøv, vit gera okkum ómak at røkka og menna hvønn einasta dag. Einfalt samskifti skulu øll kunna taka sum givið, sama hvar í landinum vit eru stødd.


Av hesi orsøk gera vit stórar, neyðugar íløgur á hvørjum ári til tess at tryggja, at vit ganga hond í hond við tørvinum í samfelagnum.

Tað, vit forvinna, skal dryppa aftur á fólkið, her býr, og longri er tann søgan ikki.


Vatn kemur aftur, har vatn hevur verið, og í 2021 gjørdu vit íløgur í samfelagið fyri 74 milliónir krónur, og tilsamans hava vit gjørt íløgur fyri slakar tríggjar millardir krónur síðani 1998. Íløgurnar í 2021 stava millum annað frá risaverkætlanini at leggja fipur-samband runt alt landið og 5G-verkætlanini, sum í stødd, vavi og torgreind ikki fer at líkjast øðrum, vit framman undan hava upplivað.

Ársúrslitið eftir skatt gjørdist 40 milliónir krónur í avlopi, og Føroya landsstýri, sum eigur allan partapeningin, fær útgoldið 30 milliónir krónur í vinningsbýti.

Íløgur í immateriella og materiella støðisogn síðani 2012



Vinningsbýti síðani 2012



Burðardygt mál í eygsjón



Bogin er spentur, og málið er í eygsjón. Í 2030 miða vit eftir at vera 100% CO_2-frí. Við elbilum, jarðhita og sjóhita minkaðu vit CO_2-útlátið við góðum 179 tonsum í 2021 í mun til árið fyri.

Sum samtak koma vit dagliga út í nærum hvønn krók í Føroyum. Vit hava til samans 330 bygningar, tøknihús og -skáp og mastrar runt í øllum landinum, og saman við stórum bilaflota, ið telur 65 bilar, bussar og vøruvognar, hevur hetta við sær nærum 3.000 tons av CO_2-útláti um árið.

At verja umhvørvið og nýta orku skynsamt er ikki fremmant fyri okkum. Í dagsins samfelagi hava vit skyldu at virka fyri burðardyggari menning og vøkstri, uttan at tað natúrliga tilfeingið versnar fyri komandi ættlarlið.

Seinastu árini hava vit sostatt arbeitt miðvíst fyri at minka CO_2-útlátið, og í 2020 varð sjøtul loksins settur á grøna langtíðarætlan fyri alt samtakið. Í 2021 tók burðardygga ætlanin veruliga dik á seg, tá ið tað eydnaðist okkum at minka CO_2-útlátið við góðum 179 tonsum í mun til árið fyri.

Minkingin stavaði í høvuðsheitum frá trimum íløgum. Í fyrsta lagi varð oljufýring skift út við jarðhita í tøknihúsinum í Søldarfirði, í øðrum lagi varð sjóhiti lagdur inn í telefonstøðina í Klaksvík og í triðja lagi vórðu tríggir bilar skiftir út við elbilar. Hesar íløgur eru trý av mongum fetum á leiðini at verða CO_2-frí á vavi 1 og vavi 2.

Málið er í eygsjón, hóast tað framvegis er langt á mál. Tvær líknandi íløgur verða væntandi lidnar á vári 2022, tá ið jarðhiti er settur til í bygninginum á Tvøroyri, og telefonstøðin í Miðvági er tikin niður til frama fyri lágorkuhús við sólskipan.



Bogin er spentur, og málið er í eygsjón.

Í 2030 miða vit eftir at vera 100% CO_2-frí. Við elbilum, jarðhita, sjóhita og øðrum effektiviseringum minkaðu vit CO_2-útlátið við góðum 179 tonsum í 2021 í mun til árið fyri.



Rammuverk
Vit brúka vísindalig tilmæli og altjóða rammuverk, ið eru væl grundað, at rætta okkum eftir, tá ið vit áseta mál.

Lyklatøl	Eind	2021
CO_2e, vav 1	Tons	320
CO_2e, vav 2	Tons	2.497
Orkunýtsla	tCO2e	2.817

Vav 1
Beinleiðis útlát, ið er frá brenning av lívrunnum brennievnum – føstum, flótandi og gassi – til upphiting, sum eitt nú skapar framdrátt í akførum og flutningstólum.

Vav 2
Elnýtsla, ið elvir til óbeinleiðis útlát umvegis brenning av lívrunnum brennievnum í orkustøðum til tess at framleiða orku.

Vav 3
Óbeinleiðis útlát frá virksemi, ið fyritøkan ikki eigur ella hevur ræði á, men sum er liður í virðisketuni. Vav 3 fevnir um alt útlát, ið ikki verður roknað við í vav 1 og 2.

Operatión null CO_2-útlát

Í 2021 fór verkætlanin Burðardygt Vinnulív av bakkastokki. Talan er um samstarv millum 12 fyritøkur, sum allar hava bundið seg til at minka CO_2-útlátið.

Burðardygt Vinnulív hevur til endamáls at menna mannagongdir í føroysku vinnuni og stuðla arbeiðnum at røkka ST-heimsmálunum um burðardygga menning. Tað er ikki av ongum, at vit eru ein av hesum fyritøkum.

Í áravís hava ábyrgd og burðardygd verið fast inngrógvið í okkara DNA og hava lagt støðið undir rakstri og avgerðum í sambandi við val av nýggjum orkuloysnum.

Vit stuðla verkætlanini av heilum huga og hava bundið okkum til at vera 100% CO_2-frí á vavi 1 og vavi 2 í 2030. Í 2021 settu vit hol á arbeiðið at seta burðardyggu langtíðarætlanina, sum varð sett út í kortið í 2020, í formligar karmar, sum eru rótfest í øllum samtakinum. Tað merkir í stórum, at alt CO_2-útlát verður kannað, mált og sett í ítøkiligar ætlanir.

Veðurlagsbroytingar
Vit skera alt CO_2-útlát burtur í vav 1 og vav 2 áðrenn 2030 við at avkola nýtslu av ravmagni samsvarandi ætlanini um avkoling hjá almennu orkuveitarunum. Vit fara frá diesel- og bensinbilum til elbilar, vit fara framhaldandi at menna núverandi fjarhitaskipan, og vit fara frá gassoljuhitaskipanum til jarð- og sjóhitaskipanir.

Hav og land
Áðrenn 2030 verða vit netpositiv viðvíkjandi tí ávirkan, vit hava á hav og land, tá ið vit leggja og útvega kaðlar. Vit burturbeina infrakervið, ið er tikið úr nýtslu, og vit fara at hugsavna okkum meira um burðardygt tilfar, og hvaðani vit útvega okkum tilfarið. Vit fara eisini at hava atlit at og avmarka ávirkanina á umhvørvið, tá ið vit leggja nýggjar kaðlar.

Øll útlát og allir umrokningarfaktorar fyri beinleiðis útláti (vav 1) koma frá dátum hjá DEFRA (Ongland) frá 2020, og útlátsfaktorar fyri elnýtslu eru grundaðir á nýggjastu tølini, vit hava fingið frá SEV.

Útlát frá fjarhita er mett við støði í kolevnisfaktori hjá verkætlanartoyminum, ið tvinnar saman lutfalsliga partin av útláti frá ráevnum millum spillolju, gassolju, orku frá burturkasti og lívmegn við viðkomandi kolevnisfaktorum, sum bretska stjórnin hevur ásett í "Greenhouse gas reporting: conversion factors 2020". Hesir faktorar lýsa eyðkenda innihaldið av kolevni í hesum ráevnum.

Rótin til ábyrgd

Visjónin at knýta Føroyar í eina betri framtíð byggir á grundleggjandi súlur, sum eru berandi í strategiini fyri okkara samfelagstilvit og burðardyggu leið. Øll skulu vera við, kundin og starvsfólkini eru í miðdeplinum, og ávirkanin á jørðina skal vera so lítil sum gjørligt.



Menniskjaligur framburður

Føroya Tele skal vera so menniskjaligt sum yvirhøvur til ber, og tað er tí, vit leggja stóran dent á framburð millum starvsfólk. Tað er gjøgnum starvsfólkini, at vit røkka okkara málum og hava yvirlutan yvir kundavæntanum og kunnu møta kundanum júst har, hann er.

Við hesum í huga saman við ymiskum førleikum og eginleikum skulu vit vera best, fremst, ábyrgdarfull og slóðbrótarar.



Talgild samansjóðing

Bulurin í øllum, vit gera, er, at øll skulu við. Einfalt samskifti skulu øll taka sum givið, og tað er tí, at vit áhaldandi arbeiða við at veita 100% landsumfatandi dekning og tippa talgildu gjónna, so øll hava atgongd til samskifti, sama hvar í landinum vit eru stødd.

Samskifti er megi, og hesa megi skulu øll hava atgongd til. Móðir til barn, maki til maka, starvsfólk til arbeiðsgevara og kundi til fyritøku.



Umhvørvisvinarlig fótaspor

Hóast virksemið fevnir um alt frá sjókaðlum á havsins botni til sendistøðir á himmalhválvinum, skulu vit til eina og hvørja tíð avmarka umhvørvisslóðina.

Ítøkiliga merkir hetta, at vit alla tíðina miða eftir null CO_2-útláti og at nýta orku skynsamt. Tað eru fleiri stig á leiðini, men fyrsta málið er at spara 2.841 tons av CO_2 -útláti.

Blómandi verð tørvar blómandi samfelag



Tilverugrundarlagið hjá okkum er at knýta alt og øll saman í eina betri framtíð og syrgja fyri, at Føroyar blóma og vaksa til frama fyri góðan framburð og ómaksleyst samskifti.


Blómandi verðin hevur tørv á blómandi samfelag okkara, men tað skal gerast við skili.


Grøni farnetansarin

Meðan vit lúka treytirnar at veita farnet í avgjørdum heimsklassa, taka vit stór fet á leiðini at minka okkara umhvørvisslóð. Í 2020 varð ferð sett á at menna farnetið við orkusparandi stillingum, sum leggja upp fyri fólkatættleika og nýtslu, og í 2021 helt arbeiðið fram.

Talan er um grønan farnetansara, sum kortleggur nágreiniliga nýtslu á øllum sendistøðum og tendrar og sløkkir sendistøðirnar alt eftir tørvi. Hetta merkir, at orkuframleiðslan í netinum er knýtt at nýtslu og ikki tíðaráseting, og harvið minka bæði streymnýtsla og útlát.

Við nýggja farnetinum frá Ericsson verður netið uppaftur dynamiskari, og tað gongur hond í hond við okkara aðalmál um burðardygga menning.






Birta upp 5G

Í mong ár hava vit lagt lunnar undir fjarskifti og veitt dygdargóðar tænastur. Í næstum taka vit eitt natúrligt næsta fet, sum flytur blómandi samfelagið inn í framtíðina. Í 2021 varð sáttmáli undirskrivaður við Ericsson um at uppstiga og nútíðargera farnetið við eitt nú 5G.

Kring heimin síggja vit, at 5G er vorðið týðandi partur av grundarlagnum undir talgilda samfelagnum, har ið alsamt fleiri tól verða knýtt at internetinum. Soleiðis skal tað eisini verða her heima.

5G er nýggjasta ættarlið av farneti og verður mett til nakað, sum í støddd, vavi og torgreind ikki fer at líkjast øðrum, vit hava upplivað fyrr. Tað einasta, sum verður øðrvísi, er alt, tí 5G letur dyrnar upp fyri nýhugsandi møguleikum. Hesir møguleikar eru neyðugir fyri blómandi samfelagið, sum mennist við rúkandi ferð.

5G hevur kapasitet at handfara og knýta milliónir av tólum saman, og tað hevur við sær nýggjar møguleikar fyri næsta ættarliðið av hugskotsmennarum og føroyska búskapinum.



Fipur brúkar upp til tólv ferðir minni orku, og harvið er verkætlanin ein liður í operatiónini at minka CO_2-útlátið.

Fipurvegurin til færri fótaspor

NET er tað, sum bindur okkum saman og syrgir fyri, at allir føroyingar kunnu taka ómaksleyst samskifti sum givið. Fyri góðum trimum árum síðani fór verkætlanin at leggja fipur inn til hvørt húsarhald av bakkastokki.


Talan er um umfatandi, men neyðuga verkætlan, har ið alt undirstøðukervið verður skift út og lagt av nýggjum, tí kopartøknin hevur í stóran mun tænt fyri seg. Fipur er skynsamari í rakstri, tilfarið er bíligari og tøknin er lættari atkomulig og lættari at umvæla.

Í 2021 tók arbeiðið dik á seg, og altjóða kanningar vísa, at fipur er umhvørvisvinaligari enn kopar. Fipur brúkar upp til tólv ferðir minni orku, og harvið er verkætlanin ein liður í operatiónini at minka CO_2-útlátið, so vit at enda eru 100% CO_2-frí á vavi 1 og vavi 2 í 2030.

Ljós á havsins botni

Føroyar liggja fjarskotnar, og tískil er umráðandi, at vit ikki liva avbyrgd frá umheiminum. Samband er fortreyt fyri at virka í heimssamfelag okkara, har ið landamørk og frástøða hava lítið at siga, og ein og hvør skal røkka runt knøttin akkurát sum einki.


Hesum syrgir ljós á havsins botni fyri, tí undirsjóvarkaðlar knýta Føroyar saman við umheimin. Kaðlarnir eru ljósleiðaratægrir úr sama fipurtilfari, sum nú verður lagt inn til hvørt húsarhald í Føroyum.



Sverri Sandberg Nielsen

Tað var maður, sum fleyg á spentum veingjum avstað. Hann hevði dirvi, megi og vilja at røkka máli og gera dreym til veruleika. Hann spenti fót í bekk, tí hann vildi verða heimsins besti rógvari.




TOKYO 2020
Vit stuðlaðu Sverra í hvørjum taki.



Vøkstur í beinan norðan

Fyri hvønn dag, ið gongur, fær skjótt og svikaleyst samband meiri og meiri at siga. Bæði fyri einstaka føroyingin og fyri framburðin í okkara samfelag. Ómaksleyst samskifti skulu allir føroyingar kunna taka sum givið, tí tað er treytin fyri at virka í heimssamfelag okkara.

Her eru samantald tøl, sum vísa týdningin av ómaksleysum samskifti. Fartelefon- og internetnýtsla eru støðugt vaksandi millum okkara kundar, og tað eru tílík tøl, sum gera okkum før fyri at taka rættar avgerðir fyri at ganga vaksandi tørvinum á møti.

Farnet

3,5 mió. +35%
gigabytes vórðu brúkt í Føroyum.

200 tús.
gigabytes vórðu brúkt uttanlands.

132 mió. +18%
minuttir vórðu tosaðir í Føroyum.

10 mió.
minuttir vórðu tosaðir uttanlands.

12,8 mió. -19%
smsir vórðu send í Føroyum.

460 tús.
smsir vórðu send uttanlands.

Breiðband

69 mió. +21%
gigabytes vórðu brúkt á breiðbandinum.

500
nýggj húsarhald fingu atgongd til fipurbreiðband.

27 km.
av fipurkaðlum vórðu lagdir í staðin fyri kopar.

Kundatænasta

77 tús. +15%
ferðir svaraðu tænastudeildirnar telefonini.


11 tús.
ymiskar spurningar vórðu avgreiddir av tænastudeildunum gjøgnum teldupost.

Sona

6 mió. +15%
leitingar vórðu gjørdar á Sona.

4,4 mió. +33%
síðuvísingar á sona.fo.

41 tús. +17%
hava tikið Sona appina niður



Síðuvísingar á sona.fo

Kundin í miðdeplinum



Sum veitari av samskiftistøkni er tað umráðandi at ganga á odda í nærverandi samskifti og kundarøkt. Vit gera okkum tískil stóran ómak at tæna hvørjum einasta kunda, tí sterkast av øllum bondum eru tey bond, sum vit menniskju knýta.

Hesi bond knýtast best og vara eisini longst, tá ið møguleikin fyri góðum samskifti er til staðar, og tað er hesum, vit gera okkum stóran ómak við hvønn dag. Á hvørjum ári gera vit kundakanningar við støði í nøgdsemi og loyaliteti.

Í 2021 svaraðu í alt 4.914 Ver-kundar og 230 vinnufyritøkur kanningini, og úrslitið bendir á, at vit standa okkum væl sammett við líknandi fyritøkur í Norðurlondum.


Síðani 2015 hevur nøgdsemi og loyalitetur verið støðugt vaksandi, umframt at Net Promoter Score – stytt NPS – ber boð um, at meiriluti av kundum er fyrisprákarar og viðmælir okkum fram um onnur á marknaðinum.

Ver	Vinna
30	43

Net Promoter Score er úrslitagóður og einfaldur háttur at máta og skilja nøgdsemi og loyalitet. Hátturin byggir á ein spurning um sannlíkindini fyri, at kundar viðmæla tann, sum spyr.

Nærverandi kundasamskifti er at lurta og skilja og hugsa í loysnum heldur enn at oyðsla við orðum. Tað ræður um at veita trygd fyri, at kundar hava álit á okkum og kenna seg tryggar, tá ið teir brúka vørur og tænastur frá okkum.





Nøgdsemi og **loyalitetur** verða máld við støði í European Performance Satisfaction Index-stiganum; stytt EPSI. Svargevararnir svara á stigmátara frá 1 til 10. Spurningar um royndir og væntanir umframt viðmæli og sannlíkindi fyri, at man er kundi um eitt ár, mynda úrslitið.



Hagtøl fyri luttøku

94%

2020 2019
97% **97%**

Hagtøl fyri arbeiðsgleði

80

2020 2019
77 **78**

Hagtøl fyri loyalitet

85

2020 2019
83 **85**

Úrslitini merkja, at arbeiðsgleðin og loyaliteturin hjá starvsfólkum í samtakinum eru munandi størri enn í miðal á danska arbeiðsmarknaðinum. Við støði í úrslitinum teljast vit millum bestu fyritøkur í Norðurlondum.

Einstaklingar í eini heild

188	18-72	4	6	8
Starvsfólk	Aldurspenni	Lestrarstørv	Lærlingar	Starvsnæmingar

Okkara størsta styrki er starvsfólkini. Tað krevur nógv meira enn bara heimsins bestu tøkni at flyta Føroyar frameftir. Tað krevur fólk við ymiskum førleikum og sjónarmiðum, og tað krevur fólk, sum duga at laga seg eftir einum heimi í støðugari broyting.

Føroya Tele varð ikki bygt eftir einum degi, men líka frá fyrstu telefonlinju og til dagin í dag hevur endamálið verið eittans: At knýta Føroyar og fólkið, her býr, saman. Hetta er stórur leiklutur í einum nútímans samfelagi sum okkara.

Endamálið er okkara DNA, og hóast vit eru ein samanbundin heild, bera vit ymiskar førleikar, sum eru við til at skapa heildina. Vit leggja øll eina varandi slóð eftir okkum, og hvør sær traðka vit fótaspor, sum gera eins stóran mun og allar tær grótrúgvur, sum undangongufólk hava laðað millum ár og dag.

Tað er sostatt umráðandi, at vit blanda DNA-strongin saman við eyðkenni hjá hvørjum einstøkum starvsfólki og soleiðis røkka málinum.

Starvsfólk, sum trívast, eru motiverað og mennast, eru fortreyt fyri endamálinum at tryggja framburð og góðsku.

Á hvørjum ári verður trivnaður millum starvsfólk vigaður og kannaður, og kanningin í 2021 borgaði fyri stórum nøgdsemi, sum ikki kemur av sær sjálvum. Samanlíkna vit okkum við líknandi fyritøkur í Norðurlondum, teljast vit millum tey fremstu.

Vit vilja, at starvsfólk skulu hava eins atgongd til menning og ábyrgd. Vit eru sannførd um, at vit fáa eitt enn betri arbeiðsumhvørvi og skynsamt virksemi, um vit skapa umstøður fyri uppaftur javnari kynsbýti.

Søguliga sæð hevur samtakið havt meiriluta av mannfólki í starvi, og sama lutfall er galdandi í dag. Tó gongur kynsbýtið í leiðslusamansetingum og nevndarhøpi á odda í greiðu kósini fyri javnari kynsbýti.

Sum dømi byrjaðu átta starvsfólk í nýggjum leiðsluleiklutum í Føroya Tele samtakinum í 2021, og kynsbýtið teirra millum var javnt býtt kvinnur og menn.

Vit hava áhaldandi fokus á at draga at okkum og halda fast í røttum førleikum, soleiðis at vit tryggja ein starvsfólkahóp, ið er skynsamt samansettur, og har starvsfólk eru tilvitað um menningarmøguleikar í samtakinum.



Kynsbýti í samtakinum



Kynsbýti í leiðsluni

ESG-lyklatøl

Umhvørvið

Lyklatøl	Eind	Visjón 2030	2021	2020
CO_2e, vav 1	Tons	0	320	426
CO_2e, vav 2	Tons	0	2.497	2.570
Orkunýtsla	tCO2e	0	2.817	2.996

ESG-lyklatøl

Starvsfólk

Lyklatøl	Eind	2021	2020
Arbeiðsstyrki	Fulla tíð %	179	183
Starvsfólkaskifti	%	13,3	10,7
Sjúkrafrávera	Dagar/starvsfólk	7,4	6,5

Kynsbýti			
Kvinnur	%	28	27
Menn	%	72	73

Kynsbýti á leiðslustigi			
Kvinnur	%	43	29
Menn	%	57	71

ESG-lyklatøl

Nevndir

	2021		2020	
Feløg	Kvinnur	Menn	Kvinnur	Menn
Móðurfelagið	29%	71%	29%	71%
FT Samskifti	33%	67%	0%	100%
NET	33%	67%	17%	83%
Televarpið	0%	100%	0%	100%
Shefa	0%	100%	0%	100%

ESG í tølum



Við støði í leiklutinum í samfelagnum og móti kundum og starvsfólkum brúka vit Heimsmálini og Global Compact hjá ST sum íblástur, tá ið vit skipa virksemið og átøk innanhýsis í samtakinum og nærsamfelagnum.

ESG-tøl eru við í heildarmyndini, tá ið ST Heimsmálini skulu metast. ESG er háttur at meta um, hvussu ábyrgdarfullar fyritøkur eru viðvíkjandi umhvørvi, sosialum umstøðum og leiðslu. Metingin er tætt knýtt at burðardyggum íløgum, sum eru raðfestar og gjørdar enn meira viðkomandi seinastu árini.



Frá Japan til Brasil

Okkum leingist heim, tá ið vit ferðast, og okkum leingist eftir at stinga av suðureftir, tá ið veturin sløkkir ljósið í Føroyum. Øllum fólkum leingist, og tá er samband alfa og omega. Verðin er stór, men við VerSumHeima er verðin tó so lítil.

Tænastan er galdandi ymsastaðni kring allan heimin, og í 2021 settu vit átta nýggj lond á VerSumHeima-heimskortið.

Vælkomin, Japan, Filipsoyggjar, Brasil, Argentina, Meksiko, Georgia, Demokratiska Lýðveldið Kongo og Suðurafrika.



500 tímar við føroyskum



Í 2021 setti Televarpið ferðina upp at menna egið sjónvarp. Afturat føroyskum fótbólti, sum hevur verið sendur beinleiðis síðani 2019, kom nógv á skaftið.

Aðalmálið hjá Televarpinum er at bjóða sjónvarp til føroysk húsarhald.

Síðani 2002 hevur stórur dentur verið lagdur á at veita breitt úrval av sjónvarpsrásum og haldum, sum eru sett saman á ein hátt, at eitt og hvørt húsarhald finnur loysn, sum passar til tørvin.

Í dag røkkur sendinetið út til umleið 94% av føroysku húsarhaldunum, og í 2019 varð farið undir at senda IPTV, sum við tíðini skal røkka út til allar Føroyar. Við støði í aðalmálinum fór Televarpið veruliga undir at menna og senda egið sjónvarpstilfar í 2021.

Televarpið vil skilja seg burtur úr kappingini á marknaðinum og veita kundum eina heildaruppliving. Hetta eydnaðist væl, og Televarpið framleiddi góðar 500 tímar av egnum føroyskum sjónvarpstilfari.





Rúm fyri nógvum
Fótbóltur setti aftur dám á sendiflatuna hjá Televarpinum í 2021. Umframt Betri deildina við monnum vórðu einstakir dystir í Betri deildini við kvinnum og A-landsdystir hjá kvinnum sendir beinleiðis á Rás1, og harumframt var eisini plass fyri evropeiskari luttøku hjá KÍ, HB og NSÍ.

U21-landsliðið við monnum stríddist manniliga í EM-undankapping, og dystirnir móti Fraklandi og Norðurmakedónia vórðu sendir beinleiðis, men fótbóltur var ikki alt. Har var eisini rúm fyri Sverra Sandberg Nielsen og stórmøtum hjá Heimamissiónini.

Landsinnsavningin hjá Reyða Krossi varð fyri fyrstu ferð send á Rás1, og tað varð eisini fótbóltssendingin 45, sum tók samanum kappingarárið 2021 í føroyskum fótbólti, og har ið ársins lið varð sett og ársins mál vórðu vald.

Í 2021 varð farið undir at senda flogbólt beinleiði á Rás1.Avtala varð gjørd við Flógbóltssamband Føroya um at vísa dystirnar í Føroya Tele deildunum hjá kvinnum og monnum.

Við ársbyrjan 2022 varð farið undir at framleiða og senda aktualitetssendingina Búskapur & Vinna við Johnny í Grótinum sum verti, har ið hann setti sjóneykuna á ymisk búskaparevni.


FØROYATELE
TELEVARPID
SHEFA
NET